## Friðarligt vikuskifti

Hóast Fjarðastevna hevur verið um vikuskiftið, so sigur løgreglan í høvuðsstaðnum frá einum heldur friðarligum vikuskifti.

Vakthavandi sigur, at fleiri smærri fráboðanir vóru, men ikki nógv, sum var álvarsamt.

Dansur var í ítróttarhøllini í Vestmanna. Har varð ein maður niðursligin. Talan var um tveir mans, sum vóru farnir í rok, men ongin sak kemur burtur úr hesum. Annar maðurin varð koyrdur heim og hin til Havnar.

Okkurt smávegis ferðsluóhapp hevur eisini verið, men ikki nakað álvarsligt.

– Sum heild eitt av teimum vikuskiftunum, har ongi stór ting hava verið, verður sagt av løgreglustøðini í Havn.

**- sae -**

## Stuldur á vallaraheimi

Sunnudagin fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein ringur var stolin á vallaraheiminum hjá hotel Føroyum.

Talan var um ein ring við einum virði upp á umleið 15.-20.000 krónur.

Løgreglan hevur ongan undir illgruna, sum møguliga kann hava framt stuldurin.

**- sae -**

## Sigldu undan løgregluni

**Meginparturin av sunnudegnum hjá løgregluni í eysturoynni fór við at jagstra ein bát. Tveir mans sigldu við honum. Teir vóru báðir rúsdrekka ávirkaðir og sendu út neyðrakettir til stuttleika**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Um hálvgum fýra tíðina sunnudagin fekk løgreglan í eysturoynni eina fráboðan frá løgregluni í Klaksvík, at ein bátur var farin av Klaksvík við tveimum fullum monnum umborð.

Úr Klaksvík varð sagt, at menninir helst vóru á veg til Fuglafjarðar, har Varmakelda var um vikuskifti. Løgreglan stóð so fyri teimum, tá teir komu til Fuglafjørð, men menninir vendu út frá aftur, tá teir varnaðust løgregluna í Fuglafirði.

Og so byrjað ein jagstran meira ella minni, sum vardi langt út á kvøldið.

Vakthavandi sigur, at tað var eitt øgiligt stríð, tí eyga mátti haldast við menninar og bátin allatíðina. Teir sigldi fram við Leirvík og fóru so norður gjøgnum Kalsoyarfirðin. Løgreglan stóð í Kunoy, við Gjógv og í Oyndarfirði og helt eyguni við teimum.

Alt hetta fekk ein enda klokkan gott 22 á kvøldi, tá menninir løgdu at í Oyndarfirði. Teir varnaðust ikki løgregluna har, og hon fekk so handtikið menninar.

Teir verða nú skuldsettir fyri brot á sjólógina fyri at hava sent neyðrakettir út til stuttleika og fyri at hava siglt ávirkaðir av rúsdrekka.

Hetta vóru gamlir kenningar hjá løgregluni, sigur løgreglan í Runavík.

# Fingu væl burturúr

**Sunnudagin skipaði Norðdepils og Hvannasunds Róðrarfelag fyri tiltaki í Norðdepli í sambandi við, at høvuðsstuðulsavtala varð undirskrivað millum Norðoya Sparikassa, Statoil og róðrarfelagið. Tiltakið eydnaðist væl, og fekk felagið væl burturúr**

TILTAK
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Norðdepil:** Nógv fólk var savnað til tiltakið hjá lítla róðrarfelagnum, sum rættuliga er farið at gera vart við seg í kappingini um føroyameistaraheitið í róðrinum hjá seksmannaførum við monnum.

Sundabáturin, sum er nýggi báturin hjá felagnum, liggur sum nú er, sjey stig fremst í kappingini um at gerast føroyameistari.

Avtalan millum partarnar um stuðul varð klár fyri eini tíð síðani, men undirskrivingin hevur bíðað, tí at róðrarfelagið vildi gera eitt sindur burtur úr hesum. Og sunnudagin upprann so dagurin, har felagið fekk sína avtalu í hús.



*Her skriva stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg og formaðurin í Norðdepils og Hvannasunds Róðrarfelag, Niels í Buð, undir stuðulsavtaluna, sum er galdandi fyri 2004*

*Mynd: Gunnar Nolsøe*

### Seldu bátar

Norðdepils og Hvannasunds róðrarfelag átti tríggjar bátar sunnudagin, áðrenn tiltakið byrjaði. Sundabátin, sum er nýggjur. Og so fimm mannafarið Rituna og tíggjumannafarið Norðoying. Hesir báðri seinnu bátarnir vórðu seldir á uppboði sunnudagin.

Ritan fór fyri 12.000 krónur og Norðoyingur fyri 9.000 krónur. Hetta fegnast felagið sera nógv um, sigur Martin Simonsen, ein av nevndarlimunum.

Felagið hevur keypt ein nýggjan bát til komandi kappingarár. Tað verður ein nýggj Rita, sum fer at taka lut í kappróðrinum komandi ár.

Martin ivast ikki í, at góðu úrslitini hjá Sundabátinum eru við til at birta upp undir áhugan fyri kappróðrinum aftur í Norðdepli og Hvannasundi.

– Vit fingu væl burturúr, og eru vit sera takk som fyri allan stuðulin, sum vit hava fingið. Serliga frá Statoil, Norðoya Sparikassa, Norðfra og øllum fólkunum, sum so trúliga møttu upp sunnudagin og hava stuðlað okkum alt árið, sigur Martin Simonsen, sum eisini er róðursmaður á Sundabátinum.



*Umframt uppboðssøluna av gomlu bátunum og sáttmálaundirskriving, var eisini tombola, skjótikapping og annað á skránni sunnudagin. Og eisini vitjaði Silvi*

*Mynd: Gunnar Nolsøe*

# Gamlir vinir dansa úti í Grøv

Mikudagin 5. juli verður eitt tiltak fyri eldri og øll onnur, sum eru áhugað. Tað er áhugabólkurin fyri eldri í norðoyggjum, sum skipar fyri tiltakinum.

Á skránni verður millum annað felagssangur og limir úr Gamle venner dansibólkinum úr Danmark luttaka eisini á tiltakinum.

Um veðrið ikki verður til vildar mikudagin, verður tiltakið flutt í Skálan.

Fyrstu ferð, at eldraráðið skipaði fyri eldrahugna í norðoyggjum var í 1998. Síðani tað hevur tiltakið verið á hvørjum ári og onnur við. Undirtøkan hevur verið góð undanfarin ár, og vóna fyriskipararnir, at tað verður tað sama í ár.

**- sae -**




